# modellbilum



er ein av teimum.

Jákup Frants sigur, at hann helt hetta vera lygn, men alt, sum seljarin hevði sagt honum, var rætt.

– So, eg keypti bilin fyri 2.000 krónur, sum er millum teir dýrastu, eg eigi. Tó er onkur bilur dýrari enn tað, og ofta hongur prísurin saman við, hvussu nógv eintøk eru framleidd av einum ávísum modelli, leggur hann aftrat.

Síðan hann keypti bilin, sum hevur sínar røtur í Chili, er Jákup Frants uppringdur av manni, sum vildi hava bilin við til eina framsýning.

– Hesin helt, at hann kundi selja bilin fyri meg fyri einar 30.000 krónur. Men tað hevði eg ongan áhuga í. Einki úr mínum savni er til sølu.

Tá Sosialurin vitjaði Jákup Frants Larsen í Fuglafirði seinasta hósdag, vísti hann okkum partar av stóra savninum. Aftrat bilum og súklum, hevur hann eisini modellskip, eins og hondgjørd skip og bátar.

– Hóast eg havi savnað modellbilar øll hesi mongu ár, finni eg altíð av og á onkran bil, sum eg ikki eigi, sigur Jákup Frants Larsen.

## Mest eg sjálvur

Jákup Frants og konan, Marjun, eiga tríggjar synir, sum allir eru vaksnir. Hin yngsti er 20 – og hin elsti er 36 ár.

– Eg vil siga, at teir hava allir havt ein ávísan áhuga fyri savninum og kanska serliga hin elsti, sum sjálvur er bilmekanikari.

Jákup Frants Larsen eigur eisini tríggjar gamlar bilar og eina gamla motorsúklu.

– Eg eigi soleiðis ein Ford Taunus, sum verður 40 ár í summar, ein Volvo Amason, sum verður 44 ár – og so eigi eg eisini Jaguarin, sum Svenning Johannesen í sínari tíð átti, sigur hann.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Hevur starvast á kommunu-skrivstovuni í 37 ár

**– Fert tú aktivt upp í politikk, verður tú ikki langlívaður í starvinum sum kommunuskrivari, vóru ráðini, sum fyrrverandi skrivarin gav mær, og hesum ráðum havi eg fylgt, sigur Jákup Frants Larsen**



*- Eg eigi einar 700-800 modellbilar og eitt hampiligt tal av modellum av gomlum motorsúklum. Haraftrat eigi eg tríggjar gamlar bilar, sigur Jákup Frants Larsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Vilmund Jacobsen

Hin 1. juli í ár hevur Jákup Frants Larsen starvast á kommunuskrivstovuni hjá Fuglafjarðar kommunu í samfull 37 ár. Hann var fyrst skrivstovumaður í eitt ár, og tá Obert Eliasen, sum tá var kommunuskrivari, gavst, tók Jákup Frants við hesum starvi. Hetta álitisstarv hevur hann røkt øll árini síðan.

– Eg havi ongantíð verið aktivur í kommunalpolitikki sum bygdaráðs-ella býráðslimur, men eg siti sum formaður fyri starvsfólkini í Kommunusamskipan Føroya.

Jákup Frants sigur, at tá hann varð valdur til skrivara, legði Obert Eliasen honum tey ráð ongantíð at fara upp í kommunal- ella landspolitikk.

– Fert tú aktivt upp í politikk, verður tú ikki langlívaður í starvinum sum kommunuskrivari, segði hann, og hesum havi eg fylgt.

Hann sigur, at einaferð eydnaðist honum ikki at sleppa undan at stilla upp til bygdarráðsval.

– Hetta var ímóti mínum vilja, og eg heitti á familjuna um ikki at velja meg. Kortini fekk nakrar atkvøður, sigur Jákup Frants Larsen.

*vilmund@sosialurin.fo*

